Formansfrágreiðing.

Inngangur.

Nú vit skriva 2006 hevur MBF 25 ár á baki. Tað er eitt givið høvi at líta seg um og hyggja uppá, um vit eru á rættari leið. Tað kundi verið passandi at hugt í bókina " Søgan um hini", og sett sær spurningin um vit eru komin nakað á leið síðani 1981 tá vit stovnaðu MBF.

Í innganginum sigur høvundurin nakað soleiðis. " *Ì okkara framkomna samfelag tykist tað, sum fólk, ið á ein ella annan hátt víkja frá, ikki longur eru ein minnilutabólkur; men í víðastu merking fevna tey um so nógv, at trupulleikin er, um tað gevur nakra meining at tosa um fólk, ið víkja frá. Kanska átti heldur at verið spurt, um ikki samfelagið er á skeivari leið.*
Samfelagið hevur brúk fyri effektivum, arbeiðssomum fólkum við árœði, ið duga at laga seg til nýggjar avbjóðingar. Tey fólk, ið ikki hava møguleika ella orku at taka við hesum mongu avbjóðingum, koma tí at verða ein serligur bólkur. Samfelagið fatar ein persón sum normalan, um hann megnar at lívbjarga sær og sínum.
Eitt brek nýtist ikki at verða støðugt. Men tað veldst nógv um tær ytru umstøðurnar, hvussu avleiðingarnar verða. Betur eitt samfelag dugir og vil laga seg eftir tørvinum hjá tí einstaka við breki, minni verða trupulleikarnir hjá honum, og minni brekaðan kennir hann seg at verða.

Tað er meiri rættvíst fyri tann sum ber eitt brek, at lata fokus fara frá brekinum og ta støðugu kenslu av at vera til byrðu, og yvir til at samfelagið ikki megnar at útjavna tann mun, sum er millum tilboð til tey "normalu" og tey sum á ein ella annan hátt víkja frá.
Og her hevur MBF haft sín týdning seinastu 25 árini. Vit kunnu skjótt blíva samd um at rættuliga nógv er tó hent á økinum síðstu 25 árini. Eg nevni nakað av tí í leiðaranum í MBF - blaðnum hesa ferð, og skal tí ikki endurtaka tað her. Tó kann sigast at enn eru stórir trupulleikar at fáa politiska myndugleikan at seta tíð og pening av til at gera nakrar grundleggjandi broytingar, sum skulu til fyri at fólk við breki kunnu liva meiri normalt. Eg kann nevna nøkur her:

- Fjølbroytt skúlatilboð frá barnaskúla til miðnámsskúla fyri fólk við ymiskum brekum.
- Atkomu til tekstaði tíðindi í SVF.
- At kunna velja sær útbúgving eftir tí mann ynskir at gera, og ikki eftir hvar mann nú kann koma inn ella fáa atkomuligt útbúgvingartilfar.
- Vantandi byggilóggávu sum skal javnseta fólk við rørslubreki við aðrar samfelagsborgarar tá hesi skulu flyta seg runt í samfelagnum.
- Rættindi til at fáa fría eftirviðgerð eftir at verða útskrivaður av sjúkrahúsi.
- Samskipan og heildarloysnir
- Møguleikan at velja sín egna bústað.
- Rúmligari arbeiðsmarknað, sum er lagaður til ymisk fólk, millum annað fólk sum mugu av arbeiðsmarknaðinum vegna sjúku, til fólk sum bert kunnu virka undir vardum treytum. Vit hava ongan politikk á økinum.
- Meiri nútíðarhóskandi fyritíðarpensjón, sum er meiri fleksibul.

Um ikki hesi málini og onnur við verða loyst, verður eitt brek støðugt. Verða ójavnar í samfelagnum ikki útjavnaðir, er ringt at kenna seg normalan og at royna og lívbjarga sær sjálvum. Hetta krevur ein politiskan myndugleika, sum kennir týdningin av at seta pening av til at fremja hesi mál, so fólk kunnu gerast sjálvbjargin.

Virkisskráin hjá MBF hevur hesi málini á skránni og onnur við, og vit seta fokus á tey so hvørt tey eru búgvin til politiska støðutakan. Fleiri av teimum eru á skránni og vit royna at halda teimum gangandi, so tey ikki detta niðurímillum í dagliga politiska resinum. Millum annað er byggilóg, rúmligi arbeiðsmarknaðurin og alternativir bústaðarmøguleikar nakað sum arbeitt verður við. Vit vita tað gongur seint í politikki, men tað er umráðandi at vera áhaldandi og ikki missa fokus.

Við okkara 25 árum á baki, eru vit ein samstarvspartnari, sum verður spurdur eftir. Tað vildi verið óhugsandi, at nakar fór uttanum MBF at spyrja seg fyri um mál sum viðvíkja okkum. Eitt prógv um hetta er, at vit fingu eitt pláss í Visjónstorginum sum sjálvstøðugur partur, eitt tekin um at politiski myndugleikin veit, at vit ynskja sjálvi at tosa okkara søk.

Vit hava brúkt nógva orku at fyrireika átøk, sum vit skulu hava í árinum. Ein sera stórur partur av arbeiðsorkuni hevur verið at finna fígging til ymsu tiltøkini. Rehabiliteringsráðstevnan varð tað fyrsta sum fór av bakkastokki. Næsta verður Livikorskanningin sum verður á skránni, vit vita ikki, um hon verður endaliga liðug áðrenn summarferiuna, men tað vóna vit. Síðani er tað "handicapguidin" sum er í gerð, og tað er eitt sera stórt og krevjandi arbeiði. Vit vóna at fáa arbeiðið liðugt til heystar. Síðani er tað tað stóra hátíðarhaldið í Norðurlandahúsinum sjálvan stovningardagin 24 okt.
Vit enda árið við eini útgávu av einum nýggjum bóklingi, ið skal avloysa tann gamla og nú ótíðarhóskandi bóklingin "Til heim við brekaðum børnum." Hetta er ein leiðbeining til foreldur, sum fáa eitt brekað barn.

Sosialurin valdi at heiðra formannin í MBF sum Ársins kvinna í 2005. Hetta er heilt greitt eitt herðaklapp sum eg vil ogna øllum feløgunum í MBF. Eg føldi ikki at hetta einsamalt var mítt arbeiði sum formaður, men eitt herðaklapp til øll sum dagliga starvast í MBF húsinum hvønn dag, og sum gera eitt gott arbeiði fyri skipanina MBF. Her arbeiða fólk tíðliga og seint ólønt, og taka nógv tung tøk. Tað eiga tit øll takk fyri. Tað er altíð fløvandi at fáa afturmelding um at vit er virðismett millum fólk, og tí er tað gleðiligt at fólk innstilla okkum í MBF til tílíkan heiðursløn. Kekkurin uppá 5000 fór í arbeiði at gera handicapguidina.

Hvørji ynski kundi so føðingardagsbarnið havt. Mín vón er at MBF og feløg tess fáa eina størri játtan at virka undir í komandi árið. Tað er tungt at skipa fyri tiltøkum, tí alt ov nógv orka má leggjast í at finna fígging og tá verður alt ov lítil orka eftir til felagsarbeiði.

At enda vil eg vóna at vit fáa eitt gott 25 ára hald gjøgnum alt árið, og at vit kunnu gerast enn sjónligari í komandi tíðum.

Mítt framtíðarynski fyri MBF er: Onki um okkum uttan okkum.

Leila Solmunde, formaður

Virkisárið 2005.

Limastøðan.

Tað eru nú 22 limafeløg í MBF aftaná at MBD/DAMP og Høgættarfelagið vórðu limaði út pr. 1. januar 2006. Limatalið tilsamans í limafeløgunum, undir MBF, er nú millum 6500 og 7000. Í løtuni er ongin umsókn um at gerast limur í MBF, men vit vita um feløg, ið fyrireika seg til at kunna gerast limir.

Starvsnevndin.
Starvsnevndin hevur um hendi dagligu umsitingina av MBF. Starvsnevndin hevur umleið 1 fund um mánaðin, tó undantikið juli mánað. Í 2005 hava 11 starvsnevndarfundir verið hildnir. Fundarfrágreiðingar frá starvsnevndarfundunum verða lagdar út á heimasíðuna hjá MBF, undir kunning. Tær eru tó nakað umskrivaðar, so tær eru egnaðar at almannakunngera. Nicolina Dahl frá Felagnum fyri hoyribrekað, hjálpir okkum við hesum arbeiðinum.

Síðani aðalfundin í 2005 hava hesi sitið í starvsnevndini:

Leila Solmunde, formaður
Randfríð Sørensen, formaður í Epileptikarafelagnum, umboðandi Medisinska bólkin, næstformaður
Lea Wolles, formaður í LFA, umboðandi Sálarliga/ neurologiska bólkin, nevndarlimur
Hendrik Jacobsen, formaður í Sclerosefelagnum, umboðandi Rørslubólkin
Jógvan Sofus Vágsheyg, nevndarlimur í Heilafelagnum, umboðandi Samskiftisbólkin.

Skrivstovan

Leila Solmunde hevur verið formaður í Meginfelag teirra brekaðu seinastu 2 árini. Á skrivstovuni arbeiða Anna Suffía Durhuus, ið er dagligur leiðari, og Diana Thomsen, ið er sett hálva tíð sum skrivstovufólk. Kirstin Vilhelmsen arbeiðir sum reingerðarfólk 7 tímar um vikuna.

Arbeiðsuppgávurnar á skrivstovuni eru sera nógvar og víttfevnandi. Frá umsiting av m.a. Serflutningsskipanini og avlamisskjeltum til hoyringsarbeiði í samband við lógarsmíð, frá nógvum fundarvirksemi við onnur feløg, stovnar og politiskar myndugleikar til fyrireiking og stuðul í samband við kanningararbeiði og mangt, mangt annað.

Viðvíkjandi lógararbeiði fær MBF regluliga lógir til ummælis, og í einstøkum førum eru vit eisini við í fyrireikandi arbeiðinum til lógarsmíð. Í farna ári hava vit havt 14 lógir til ummælis m.a. kunngerð um stuðul til keypa av avlamisbili, kunngerð um broyting um kunngerð um heimahjálp, broyting um kunngerð um heiligvág, uppskot um lóg um dagstovnar og dagrøkt , flytan av avgerða- og kærumyndugleila o.a.

At vera við til at gera viðmerkingar til lógarsmíð krevur nógva orku. Vit hava skipað tað soleiðis, at allar lógir og kunngerðir, ið MBF fær til ummælis, verða eisini sendar út til viðkomandi limafeløg, so tey kunnu gera sínar viðmerkingar. Í einstøkum førum fáa vit serkøna hjálp frá løgfrøðingi. Ein afturvendandi trupulleiki er, at tíðarfreistirnar oftast eru alt ov stuttar. Hetta hava vit gjørt vart við upp til fleiri ferðir, uttan at tað hevur hjálpt.

Viðvíkjandi kanningararbeiði er livikorskanningin, ið Granskingardepilin fyri økismenning í Klaksvík ger fyri MBF um at verða liðug. Olga Biskopstø hevur gjørt eina stutta frágreiðing um gongdina í kanningini. Avrit av frágreiðingini er til taks.

Byggimál.Tað er eitt stórt arbeiði hjá MBF at umsita byggimál. Men í ár hava ikki verið so nógv mál á skránni sum í fjørð. Jógvan Sofus hevur átikið sær at lesa allar tekningarnar sum koma til ummælis, og hetta hevur lætt munandi um á skrivstovuni. MBF fær, sum er, ongar pengar at umsita byggimál fyri.

Vit hava tosa við landsstýrismannin í Vinnumálum, ið umsitur Landsverk, um at broyta mannagongdirnar í byggimálum. Um ikki peningur fylgir við til MBF at umsita málini, má annar stovnur átaka sær hetta arbeiði. Eitt umboð frá MBF eigur at vera við í eini møguligari bygginevnd. Enn er ongin endalig støða tikin.

MBF hevur í farna árið havt framløgur um bygging, bæði í kommunufeløgunum KSF, FKF og fyri báðum landsstýrismonnunum, so vit vóna at okkara áheitan verður fylgd, og at málið vil verða loyst innan stutta tíð.

Tað næsta sum er á skránni, er at hava ein temadag saman við HTM. Endamálið við temadegnum er at finna fram til, hvussu vit best í felag, brúka sama leist viðvíkjandi mátum, at góðkenna og ráðgeva fólki útfrá.

Tað er so at standardmát s.s. hurðabreiddir, mát av skráum og stødd av lyftum, ikki er galdandi á byggiøkinum í Føroyum, tí er vanligt at brúka ymsar Norðurlendskar standardir. Vit í MBF brúka danskar standardir.

Eftir at vit hava vitja kommunurnar í samband við ger av "handicapguidini" fær HTM nógvar fyrispurningar um atkomuviðurskiftir. Tað er tí umráðandi, at vit vita, hvat ið hvør ger, og at tær tilráðingar sum vit gera, hvør sær, eru so líkar sum møguligt. Vit vóna at kunna hava temadagin áðrenn summarfrítíðina.

Undirvísing MBF verður ofta biðin um at hava ymsar framløgur fyri hægri skúlum. Vit hava í nøkur ár haft fyrilestrar fyri Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya og Heilsuskúla Føroya. Hesir fyrilestrar snúgva seg um MBF, og hvussu tað er skipað, og um at liva við brekið, og um hvussu tað er at fáa fremmanda fólk inn í sítt heim og sítt lív. Tað at koma inn í heim og lív hjá fólki er ein sera stórur etiskur spurningur, bæði um hvussu væl tann sum skal veita hjálpina sær sín leiklut, og hvussu tann sum móttekur sær sín leiklut. Tann síðsti stovnurin sum er komin á fyrilestralistan er Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin.

MBF hevur nú fyri aðru ferð verið inni hjá einum flokki í samfelagsfrøði á Studenta og HF skeiðinum á Kambsdali fyri at siga eitt sindur frá, hvussu MBF arbeiðir og um tann týdning handicappolitiskt arbeiði hevur.
Evni seinri ferð var "Demokrati og týdningurin av at vera sjónligur ". Flokkurin sum vit vitjaðu hesa ferð, var ein sera góður flokkur. Nógvir spurningar og eitt gevandi orðaskifti, sum kann vera við til at fremja hugsjónina, at pláss skal verða fyri øll í samfelagnum. At fólk við breki kunnu og eiga at vera aktiv í samfelagnum, bæði í skúla, arbeiðsmarknaðinum og frítíðini, er eitt mál sum MBF má ganga undan og vísa á. Við hesum átakinum vil MBF gera eina roynd at verða sjónligari millum ung.

Vitjanir.
MBF fekk áheitan frá Tórshavnar býráði at móttaka sosialu deild úr býráðnum í Nuuk til eina framløgu um MBF virksemi og ein kaffimunn. Vit fortaldu teimum um, hvussu MBF er skipa og um, hvussu vit virka handicappolitiskt. Tey vísti hesum stóran ans, tí tey ikki hava serliga góða skipan á felagsarbeiðinum í Grønlandi og sera lítið av peningi sum kann gera arbeiði stabilt har.

Menning og samstarv við limafeløgini.

Uppsamling frá seinasta aðalfundi
Á seinasta aðalfundi vórðu viðtøkurnar broyttar við, at umboðsráðið varð niðurlagt, og tískil er aðalfundurin nú einsamallur hægsti myndugleiki. Teir 4 bólkarnir, ið umboðaðu ávikavist rørslubólkin, samskiftisbólkin, medisinska bólkin og bólkin fyri sálarlig/ neurologisk brek hava nú onga aðra uppgávu enn at vera grundarlag fyri vali av starvsnevndarlimum t.v.s. at hvør starvsnevndarlimur umboðar ein av omanfyrinevndu bólkum.

Ístaðin fyri umboðsráðið, er skipanin við formansfundum nú sett inn í viðtøkurnar ístaðin. Formansfundurin skal virka sum eitt fakligt forum, so at samstarvið við feløgini styrkist og fakliga støðið mennist. Starvsnevndin skipar fyri formansfundum eftir tørvi, tó í minsta lagi 2 ferðir um árið.

Formansfundir.

Í farna ári hava tveir formansfundir verið. Á fyrra fundinum var "brekaðlóg" á skránni, har Doris Hansen greiddi eitt sindur frá fyrimunum og vansum við brekaðlóg, og síðani varð høvi at kjakast um hetta evnið. Fundurin endaði við einari ætlan at skipa fyri einum skeiði, har feløgini kunnu læra eitt sindur um lógararbeiði og um brekaðlóg. Tað verða Birita Ludvíksdóttir og Heðin D. Poulsen, løgfrøðingar, ið hava átikið sær uppgávuna at undirvísa um hesi evnir. Av serligum orsøkum varð skeiðið útsett, og verður tískil í heyst.

Vit numu eisini við trupulleikan sum er á manglandi eftirviðgerðarmøguleikum í Føroyum. Niðurstøðan varð, at feløgini skuldu lata inn tilfar til MBF um, hvussu tey sóu sína støðu í feløgunum, hvønn tørv tey høvdu og hvat tey ynsktu skuldi fremjast á økinum. Bert 3 feløg lótu okkum tilfar. MBF hevur havt fund við Hans Paula Strøm, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum um tann stóra trupulleika, sum manglandi eftirviðgerð hevur fyri fólk við breki, og vit hava víst á onkrar loysnir, sum vit hildu kundi verða ein byrjan til eftirviðgerð í Føroyum fyri nakrar bólkar, eitt nú at brúka smáu sjúkrahúsini til eftirviðgerð. Enn er onki ítøkiligt úrslit komið, men vit fylgja støðugt málinum m.a. við ráðstevnuni um Rehabilitering, ið MBF skipaði fyri.

Á seinra formansfundinum høvdu vit gjørt spurningar til Visjón 2015, út frá sjónarhorninum hjá MBF. Feløgini kjakaðust óført, men ringt er at fáa tíðina at røkka til, tí málið er so breitt og umfatar so nógv feløg og nógv mál. Men fundurin gav greiða ábending um, at í MBF eru nógv mál, og at Visjónsætlanin klárt hevur við brek at gera á sera nógvum økjum. Sum limur í Visjónstorginum fær MBF høvi at viðmerkja framtíðar Visjónsætlanirnar sum koma frá ymsu bólkunum, og vit fáa tískil klárt høvi at gera vart við, at vit eru til og ynskja innlit í mál sum skulu á dagsskrá í framtíðini. At vit hava fingið pláss í Visjónstorginum, er greitt ein ábending um, at MBF er samstarvspartnari og ikki skal standa á síðulinjuni, meðan avgerðir verða tiknar

Skeið/temadag.
MBF skipaði fyri temakvøldi við skeiðshaldaranum Per Højgaard, sum er journalistur. Hann tosaði út frá evninum "at vera sjónligur." Endamálið var at geva feløgunum størri innlit í, hvussu mann ber seg at í miðlaheiminum, og at stuðla uppundir tilvitanina um, hvussu vit kunnu gerast sjónligari í samfelagskjakinum. Endamálið var eisini at menna feløgini og at styrkja samstarvið millum feløgini.

Eisini hevur eitt skeið verið hildið fyri starvsnevndina um pensjónslóggávu. Tað var Leif Olsen frá Almannastovuni, ið greiddi frá. Hann greiddi m.a. frá verandi skipan í Føroyum, men kom eisini inn á nýggju donsku pensiónsskipanina. Tað er umráðandi, at starvsnevndin sum er tann sum skal taka avgerðir og fylgja við samfelagsgongdini, hevur so stórt innlit sum gjørligt á hesum økinum. Fyritíðarpensjón er eitt mál sum ofta er frammi, og vit vita at arbeitt verður fram ímóti at gera broytingar á økinum.

Leila Solmunde hevur sitið í einum fyrireikingarbólki, ið skuldi gera arbeiðssetningin til ein arbeiðsbólk, ið verður settur at endurskoða alt fyritíðarpensjónsøkið. Fyrireikingarbólkurin hevur nú gjørt sítt arbeiði, og vit bíða nú spent eftir, at ein pensjónsbólkur skal setast, sum skal koma við einum uppskoti um, hvussu føroysku pensjónirnar skulu síggja út í 2015. Vit fáa uttan iva pláss í tí bólkinum.

Blaðútgáva.
Eg segði í fjør, at blaðið helst er flaggskipið hjá okkum í hesum árinum. Vit hava fingið eitt gott felagsblað, sum vit hava fingið sera jaliga afturmelding um. Blaðið er væl móttikið, bæði av myndugleikunum og av øðrum.

Hetta vil eg endurtaka í ár. Blaðið fær so góða afturmelding, at vit hava heilt víst valt rætt, tá ið vit avgjørdu at fáa eitt felagsblað.
Blaðið í heyst lýsti atkomu í samband við ráðstevnu sum LV skipaði fyri á Hotel Føroyum, har MBF var umboðað við fyrilestri, sum formaðurin helt. Vit settu fokus á nýggja Smyril, byggilóg og kommunalar umsitingar, sum eru rættuliga sentralar tá bygt verður. Síðani umrøddu vit rehabilitering, brekaðlóg og persónliga søgan lýsti ein ungan mann við epilepsi. Diabetesfelagið, Spastikarafelagið og Sinnisbati vóru umboðað hesa ferð.

Blaðið í vár tekur støði í sernámsfrøðiliga partinum, tali- og skrivitrupulleikanum bæði við eini dulnevndari sjálvsævisøga og við viðtalu við ein skúlastjóra. Vit lesa um teldutaluna sum hevur fingið navnið Sjúrður. Vit umrøða brekaðlóg við tveimum løgfrøðingum sum úttala seg, og vit seta fokus á manglandi forsorgarlóg. Teknmálstulkatænastan er við í blaðnum, nú tey hava 10 ár á baki. Feløgini sum koma til orðanna eru, Felagið fyri lesi- og skriviveik, Blindafelagið, Sclerosefelagið og Nýrafelagið.

Heimasíðan.
Ein týðandi táttur í samskiftinum við limafeløgini er heimasíðan. Á heimasíðuni er møguligt at lesa tíðindir frá starvsnevndini, fylgja við á kalendaranum um virksemi hjá limafeløgunum og MBF, umframt greinar, ið vit meta hava áhuga fyri limir okkara. Tíverri er heimasíðan ikki so greið og tíðarhóskandi, sum vit kundu ynskt okkum, so vónandi fáa vit eina nýggja heimasíðu innan ikki alt ov langa tíð.

Alv og rúmligi arbeiðsmarknaðurin:
ALV skipaði í apríl mánað fyri ráðstevnu um rúmliga arbeiðsmarknaðin. Á ráðstevnuni vóru nógvir sera áhugaverdir fyrilestrar um rúmliga arbeiðsmarknaðin. Bæði danskur og føroyskur arbeiðsgevari høvdu fyrilestur.

Sosiala ábyrgdin fylti rættuliga nógv hjá danska fyrilestrahaldaranum, meðan tann føroyski fyrilestrahaldarin, sum kom frá fyritøkuni Munin greiddi frá, hvussu tað var at seta ein arbeiðstarnaðan í starv.

Formaðurin í MBF var umboð í panelinum saman við politikarum, Vinnuhúsinum og FA.
Hetta var ein væleydnað ráðstevna, sum vónandi hevur gjørt sína ávirkan, so at rúmligi arbeiðsmarknaðurin vil verða frammi í ljósinum í framtíðini. Framløgan í panelinum fæst frá MBF um áhugi er fyri tí.

Ráðstevnan " Rehabilitering fyri fólk við varandi breki".

Í samband við, at MBF fyllir 25 ár skipaði MBF fyri eini ráðstevnu í Norðurlandahúsinum um rehabilitering. Hetta evni varð valt tí, at vit meta at hetta er eitt økið, ið ógvuliga stórur tørvur á í føroyska samfelagnum. Ráðstevnan eydnaðist sera væl. Um 230 fólk luttøku á stevnuni og umfataði luttakaraskarðin ein ógvuliga breiðan skarða m.a. lands- og kommununalpolitkkarar, fakfólk av ymsum slag og limir í limafeløgunum hjá MBF. Tilfar frá fyrilestrunum fæst frá MBF.

<u>Samstarv við onnur</u>

Fundir við almannastjóran
Regluligir fundir eru við almannastjóran, Petru Johnsdóttir 3. hvønn hósdag í mánaðinum. Vit taka ymisk aktuell evni upp, sum vit fáa fyrispurning um. Eitt dømi er fundur um tær broytingar sum eru gjørdar á stuðulsfólkaøkinum. Lea Wolles er ábyrgdarpersónur í starvsnevndini í málum sum viðvíkja m.a børnum og skúla, so hon var við á fundinum og legði fram sjónarmið um hesa broyting.

Vit hava eisini haft fundir um Stovnin fyri fjølbrekað børn sum ikki bleiv til nakað í Tórshavnar kommunu, og um hvat man kann fáa serliga viðbót til.
Vit meta hesa fundir sum sera týdningarmiklar, tí vit á henda hátt fáa góðar dialogar í gongd, og kunnu tosa um trupulleikar og loysnir.

Atlantic Airways.
MBF hevur havt fund við Atlantic Airways um tær mannagongdir sum eru galdandi, tá fólk sum eru blind ella rørslutarnað fara at ferðast. Hetta hava vit gjørt, tí vit hava fingið nakrar klagur um hesi viðurskiftir. Sum vit duga at síggja málið, eru ongar fasta mannagongdir, í øllum førum ikki nóg góðar. Vit hava nú fingið eitt skriv við uppskoti um mannagongdir, ið MBF nú arbeiðir víðari við.

Norðurlendskt samstarv.
MBF er við í norðurlendskum samstarvi, í NHR (Nordisk Handicappolitikse Råd) og HNR (Handicappedes Nordiske Råd).

Í HNR sita formenninir og aðalskrivararnir fyri paraplyorganisatiónirnar í norðurlondum og sjálvstýrandi økjunum og harvið umboða Leila Solmunde og Anna Suffía Durhuus Føroyar. HNR arbeiðir út frá felagsáhugamálum. Ein stórur vinningur fyri okkum í Føroyum er at í slíkum felagsskapum hava vit møguleika at síggja handicappolitikk út frá einum nógv breiðari og samansettum sjónarvinkli enn í vanliga gerandisdegi.

NHR umboðar eisini tey 5 norðanlondini, umframt tey 3 sjálvstýrandi økini. Tey 5 norðanlondini hava hvør síni 3 umboð, 1 umboðandi handicaporganisatiónirnar, 1 umboðandi politiska myndugleikan og 1 umboðandi embætisstattin. Føroyar hava bert 1 politiskt valt umboð, sum í løtuni er Leila Solmunde. Føroyar hevur nú reist spurningin um at fáa betri umboðan í NHR, soleiðis at vit bæði fáa eitt politiskt valt umboð og eitt umboð valt fyri MBF. Málið varð tikið upp á seinasta fundi og verður uppafturtikið til fundin í heyst.

Í farna ári skipaði NHR fyri einari kanning " Demokrati for Alle", og endaði henda kanning við einari ráðstevnu 2. desember á Christiansborg í Keypmannahavn. MBF stóð fyri føroyska partinum av kanningini.

Demokratiráðstevnan.
Parlamentini eiga at vera undangongustovnar tá umræður atkomuligheit fyri **allar** borgarar. Men her vantar nógv, og merkir hetta at fólk við førleikatarni verða útihýst frá møguleikanum at vera við í politiska lívinum, og har politiskar avgerðir verða tiknar. Tí setti NHR sær í 2005 fyri at kanna, hvussu demokratiið virkar, um møguleikar og avmarkingar hjá fólki við førleikatarni at vera við. Úrslitið av kanningini varð almannakunngjørt á eini ráðstevnu á Christiansborg í Keypmannahavn 2. desember 2005.

Kanningin umfatar atkomuviðurskiftini til parlamentini í Danmark, Finlandi, Íslandi, Norra, Svøríki, Áland og Føroyum. Kanningin er gjørd við spurnarbløðum, send til parlamentini og til politisku flokkarnar á tingi.

Niðurstøðan av kanningini varð, at tað fyri tað mesta er lætt at sleppa fram at parlamentunum hjá rørslutarnaðum og hoyribrekaðum, men samstundis vísti kanningin eisini, at um tú ert koyristólsbrúkari, er tað onga staðir møguligt at halda eina røðu á tingsins týdningarmesta platformi – røðarapallinum".

<u>Støðan á Føroya Løgtingi.</u>
Hyggja vit at føroyska partinum av kanningini kann sigast, at Tinghúsið hjá okkum er atkomuligt fyri rørslutarnað og koyristólsbrúkarar.
Eins og í hinum norðanlondunum sær verri út, tá talan er um deyv, sjónbrekað, lesiveik og fólk við fatanartrupulleikum. Her eru ongi atlit tikin til, at hesi m.a. kunnu fáa nakað burturúr sum áhoyrari, ella møguleikan at vera við í einum politiskum orðaskifti, og tað sama er galdandi, tá talan er um alt kunnandi tilfar, ið verður handað politikarunum m.a. fundarskráir og frágreiðingar.

Tilmælir frá NHR.

- At leiðslurnar bæði á tingi og í politisku flokkunum, átaka sær ábyrgdina av at gera eina ætlan fyri at betra um atkomuviðurskiftini til parlamentini og flokshølini sum heild.
- At hugt verður nærri eftir møguleikanum fyri, at heimasíðurnar verða betraðar, og at tann digitala atkoman fylgir rætningslinjunum smb. WAI krøvunum.

- At kunningin á heimasíðunum verður løgd fram við einari lættlesiligari orðing, so hon eisini kann lesast av fólki við lesi og fatanartrupulleikum.
- At fyrisitingin í Løgtinginum og í politisku flokkunum arbeiðir fyri at sjónvarpssendingar verða tekstaðar, og at framløgur og orðaskiftir verða teknmálstulkað, fyri at betra um møguleikan hjá deyvum og hoyribrekaðum at fylgja við.

MBF - umboðan í ráðum og nevndum.

Ráðið fyri brekað
Formaðurin í MBF er føddur limur í RfB. Sum varalimur fyri hana situr Anna Suffía Durhuus. Uni Rasmussen er valt umboð fyri MBF og Óli Wolles er valdur sum varaumboð. Barbara á Tjaldrafløtti er nýggjur formaður í Ráðnum, aftaná at Sólja í Ólavstovu, fyrrverandi formaður varð sett sum Løgtingsins Umboðsmaður.

Í Ráðnum fyri brekað varð avgjørt at taka nøkur ávís mál upp. Ein arbeiðsætlan varð gjørd, sum setti nøkur mál á skránna. Vit settu fokus á byggilóggávu, stuðulstænasta og 67 ára markið og rúmliga arbeiðsmarknaðin. Ì samband við byggilóggávu, hava vit haft fund við landsstýrismannin í innlendismálum, sum umsitur lógarverkið, og vit hava haft fund við bæði KSF (størra kommunufelagið) og FKF(minna kommunufelagið.)

MBF fekk sum vera mann, ein sera sentralan post her, við at formaðurin sum koyristólsbrúkari hevur tikið myndir av góðum sum vánaligum atkomuloysnum. Vit hava haft myndaframløgu á hesum fundunum, og vit hava tí fingið kommunalpolitikarar uppá tal, sum bara kann gagna atkomugongdini, tí vit siga meir í myndum enn í talu. Á henda hátt eru vit eisini gjørd sjónligari, av tí, at eg við at koma á støðini, fái eitt prát í gongd.

Higartil er stuðulsfólkaskipanin dottin burtur tá mann blívur 67 ár. Ráðið hevur arbeitt við hesum málið og hevur fingið broytt reglugerðina soleiðis at stuðulin nú kann halda fram, eftir at mann er vorðin 67, grundað á at brekið fer ikki burtur fyri tað um mann blívur 67, og at persónligi stuðulin er at rokna sum eitt hjálpartól. Treytin er, at tú skalt hava fingið hesa hjálpina áðrenn tú varð 67.

Næsta mál vit fara at taka upp er arbeiðsmarknaðarmál . Vit hava eisini viðgjørt málið, sum Javni arbeiðir við um ómynduggerð av menningartarnaðum. Vit hava fingið at vita, at málið kemur fyri í komandi tingsetu.

Happadráttargrunnurin.
3 limir sita í Happadráttargrunninum og eru teir: Leila Solmunde, formaður í MBF er føddur limur í grunninum, Doris Hansen umboðar MBF og Eyðun Mohr Hansen umboðar AHR. Sum varalimir sita Randfríð Sørensen, næstformaður í MBF og Kristianna Rein, formaður í Diabetesfelagnum.

Í farna ári hava verið ætlanir um at niðurleggja Happadráttin, grundað á, at ov fá spældu og harvið bar spælið seg ikki. Happadrátturin er grundarlagið undir Happadráttargrunninum, ið letur 2/3 av ágóðanum til frama fyri brekað. MBF harmaðist um hesa avgerð, av tí at ágóðin frá Happadráttargrunninum í dag er ein týðandi partur av inntøkugrundarlagnum hjá øllum feløgunum í MBF. Aftaná ein fund við Jákup Vestergaard, innlendismálaráðharra, frættist so seinri, at ætlanin við at niðurleggja Happadráttin fyribils var slept, til onkur onnur loysn var funnin.

“Ljóðbøkur”:
Margretha Næss hevur sitið sum MBF umboð í hesi nevnd í nógv ár. Endamálið hjá Ljóðbókum er at skipa fyri ljóðbókaútgávu á føroyskum máli til blind og lesitarnað fólk í øllum aldri. Í ljóðbókanevndini sita umframt Margreta Næss, Karin Kass fyri blindastovnin, Durita Joensen fyri Landsbókasavnið, Malan Hilmarsdóttir fyri Býarbókasavnið, Solveig Debess fyri Landsmiðstøðina og Tórunn Sumberg fyri Blindafelagið.

Margreta Næss er samskipari av arbeiðinum við at framleiða ljóðbøkurnar.

“Ljóðbøkur” hevur eina heimasíðu www.ljodbokur.fo, har ein sær hvørjar ljóðbøkur eru komnar út.

Ráðið fyri ferðutrygd:
Herit Joensen, Vestmanna hevur sitið sum MBF umboð í hesum ráð í nógv ár.

FUR:
MBF eigur 2 umboð í FUR, men av tí at tað ikki hevur eydnast okkum at fáa báðar sessirnar settar, er tað bert Jákup Danielsen úr Nýrafelagnum, ið hevur umboðað MBF. Jákup Danielsen er nú fluttur til Danmarkar, og tískil situr onki umboð fyri MBF í FUR. Vit fara tí við hesum at heita á limafeløg, ið hava ungdom við í sínum felag, um at finna ungfólk, í mesta lagi 30 ár, ið vilja átaka sær at sita sum MBF - umboð í FUR.

Teknmálstulkatænastan.
Formaðurin í MBF er føddur kassameistari í Teknmálstulkatænastuni, men hevur í løtuni latið henda sess til Anna Suffía Durhuus, dagligur leiðari í MBF.

Endamálið hjá Teknmálstulkatænastuni er at taka sær av samskiftinum millum teknmáksbrúkarar og hoyrandi.

Í ár eru 10 ár síðani Teknmálstulkatænastan vað stovnað, og eru nú 1,5 tulkur og 0,5 skrivari settur í starv í skipanini. Arbeitt verður í løtuni við at víðka tænastuna til eisini at umfata skrivitulking, ið er serliga vælegnað til tunghoyrd, ið ikki megna at brúka vanliga teknmálið.

Serflutningsskipanin.
Endamálið við serflutningskipanini er at veita serflutningmøguleika til fólk, ið bera brek og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól. Skipanin umfatar Tórshavnar, Klaksvíkar og Vestmanna kommunu umframt allar kommunurnar í Eysturoynni. MBF hevur umboðan í stýrinum fyri skipanini við Annu Suffíu Durhuus, dagl. leiðari í MBF. Umframt hana situr 1 umboð fyri KSF, 1 fyri FK og 1 umboð fyri AHR.

Tilgongdin til skipanina er alsamt vaksandi og í 2005 komu 118 nýggir brúkarar.

Higartil hevur MBF visitera brúkarar til skipanina. Hetta verður nú broytt, so at framyvir verður tað kommunan, ið fer at visitera brúkarar til skipanina.

Sjúklingaráðið.
Tey 3 Sjúkrahúsráðini eru nú umskipaði til 1 Sjúklingaráð fyri allar Føroyar. MBF hevur ikki beinleiðis umboðan í Sjúklingaráðnum, men limir úr limafeløgunum í MBF hava møguleika at

gerast limir í ráðnum. Í løtuni sita umboð frá Giktafelagnum, Sinnisbata, Diabetesfelagnum og Javna í ráðnum.

Sambært lógini, er uppgávan hjá sjúklingaráðnum at verða ráðgevandi hjá landsstýrismanninum í málum, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar. Ætlanin er, at ráðið skal geva landsstýrismanninum eitt breiðari avgerðargrundarlag, við at ráðgevinigin kann vera øðrvísi enn tann, hann fær frá fakpersónum í heilsuverkinum.